# Sjúrður Skaale á fólkating týsdagin

**Nýggi fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldinum fer úr løgtinginum so leingi hann er fólkatingsmaður. Hann fer beinanvegin undir at kanna, hví føroyingar uttanlands ikki flyta heimaftur. Sjúrður Skaale verður fólkatingsmaður fram til september**

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Týsdagin verður Sjúrður Skaale fókatingsmaður. Hann niðurleggur sæti á tingi fram til september fyri at røkja fólkatingsarbeiði*

Á fundinum í Fólkatinginum týsdagin í komandi viku fer Fólkatingið at atkvøða um at geva Sjúrði Skaale sæti fyri Høgna Hoydal og Annitu á Fríðriksmørk. Høgni Hoydal má leggja fólkatingssessin frá sær, tí hann er vorðin landsstýrismaður, og Annita á Fríðriksmørk verður í barnsburðarfarloyvi fram til september.

Sjúrður Skaale er valdur á ting, men hann hevur alment boðað frá, at hann ikki ætlar bæði at verða løgtingsmaður og fólkatingsmaður.

Fyribils verður Sjúrður Skaale bara løgtingsmaður í eina viku afturat.

Eitt tað fyrsta sum verður á skránni í Fólkatinginum er fíggjarlógin, so Sjúrður Skaale sleppur beint í eldin.

Hann kennir kortini væl til fólkatingsarbeiðið, tí hann hevur starvast sum skrivari hjá Norðuratlantsbólkinum.

– Eitt tað fyrsta eg fari at gera, verður at fara víðari við kanningini av, hvussu nógvir føroyingar búgva uttanlands. Tann fyrra kanningini var ein kvantitativ kanning, har vit bara kannaðu, hvussu nógvir føroyingar eru uttanlands. Eg ætli mær at kanna, hví so nógvir landsmenn velja ikki at flyta heimaftur. Fyri at kunna loysa trupulleikan, so mugu vit kenna orsøkirnar til, hví so nógvir føroyingar velja at búseta seg uttanlands, sigur Sjúrður Skaale.

Hann fer í næstum at søkja eftir studentum, sum kunnu vera við í hesum arbeið. Sjúrður Skaale sigur, at tá fólkatingsmenn fara undir slík arbeiði, so kunnu teir søkja um eina játtan frá formansskapinum, og metir formansskapurin, at her er talan um relevant politiskt arbeiðið hjá einum fólkatingspolitikkara, so verður játtan latin.

Sjúrður Skaale sigur, at størsti trupulleikin hjá okkum er, at fólkatalið stendur í stað, tí landsmenn ikki flyta heimaftur.

Umframt at vera sera virkin í fólkatinginum – at luttaka í orðaskiftum og at seta fram fyrispurningar, so ætlar Sjúrður Skaale at vera sera virkin í uttanparlamentariska arbeiðinum, sum hendan kanningin av føroyingum uttanlands er eitt dømi um.

Sjúrður Skaale heldur, at fólkatingsessurin er ein týdningarmikil sessur, tí tað er so nógv arbeiði, sum ein føroyskur fólkatingsmaður kann gera.

- Fólkatingsmaðurin er ein viðspælari – sum eisini er hentur hjá landsstýrinum at hava, sigur Sjúrður Skaale, hóast hann fyrst og fremst kennir seg at umboða flokkin, hann er valdur fyri.

Sjúrður Skaale vísir t. d. á, at grundlógin skal til fólkaatkvøðu í 2010, og í tí sambandinum fara helst at vera nógvar misskiljingar millum landsstýrið og ríkisstjórnina, sum ein fólkatingsmaður kann rudda av vegnum.

Nú Sjúrður Skaale fer í farloyvi úr løgtinginum, sleppur hann ikki at vera við í skrúðgonguni á ólavsøku.

- Tað hevur nú ikki tann stóra týdningin fyri meg, sigur Sjúrður Skaale smílandi. Hann vil bara gera púra greitt, at fólkatingsstarvið og løgtingsstarvið er so krevjandi, at tú ikki eigur at hava bæði størvinum. Um so verður, at Sjúrður Skaale skuldi verður valdur bæði á fólkating og á løgting, so fer hann at niðurleggja tingsessin. Hóast hann skuldi stillað upp til løgtingið hesa tíðina, so fer hann greitt at boðað frá í valstríðnum, at hann tekur fólkatingssessin fram um løgtingssessin.

Fyri Sjúrð Skaale møtir Finnur Helmsdal á tingi fram til september.

# Gøtustevna fyri G!

**Fyribils er G! festivalurin farin í søguna. Ístaðin verður nú arbeitt við at gera serstaka Gøtustevnu**

FESTIVALUR

*Jákup Mør*

Tað var í heyst at tað kom fram, at tað stóð so illa til fíggjarliga hjá G!Festivalinum, at hann fór so logandi á heysin.

Síðani hevur verið at hoyrt um ymsar bjargingarætlanir – og í valstríðnum vóru tað politikarar, sum beinleiðis góvu lyfti um, at tað almenna um neyðugt skuldi hjálpa til fyri at bjarga hesum festivali.

Fyrireikararnir siga nú á heimasíðuni, www.gfestival.fo, at teir framvegis kanna ymisk viðurskifti, og tí er endalig niðurstøða ikki tikin til, um G!Festivalurin endaliga er farin í søguna.

### Stevna ístaðin

Í staðin fyri G!festivalin, skipar samanlagda ítróttarfelagið millum Gøtu og Leirvík,víkingur, fyri einum stevnuvikuskifti

Nýstovnaða ítróttarfelagið millum Leirvík og Gøtu, Víkingur, fer í ár at syrgja fyri, at vónbrotnir festival-luttakarar fáa okkurt í staðin fyri G!.

- Vikuskiftið undan Ólavsøku hevur seinastu mongu árini verið stevnuvikuskiftið í Gøtu. Seinnu árini hevur tað verið G!festivalurin, sum hevur verið hetta vikuskiftið, og undan tí var tað Gøtustevnan, sum Gøtu Ítróttarfelag skipaði fyri, og sum var vikuskiftið undan Ólavsøku.

- Síðan G!festivalurin byrjaði, hava Gøtu Ítróttarfelag og G! tó valt at samstarva um ymiskt á tí praktiska økinum, heldur enn at hava tvey tiltøk sama vikuskifti.", skrivar heimasíðan hjá ítróttarfelagnum.

Víðari skrivar felagið: - Nú greitt er, at eingin G!festivalur verður í ár, fer samanlagda ítróttarfelagið í Gøtu og Leirvík, Víkingur, at skipa fyri stórum tiltaki vikuskiftið 18. til 20. juli. Seinni verður meira at frætta um, hvussu tiltakið verður fyriskipað."


UMBOÐSRÁÐSVAL 2008

VERIÐ VIÐ AT VELJA

Í ár 2008 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna

INNKOMIN VALEVNI ERU HESI:
Árni Jakobsen, Smærugøta 19, 100 Tórshavn
Dánjal Jakobsen, Andrasargøta 14, 188 Hoyvík
Emil Jacobsen, Skálavegur 193, 480 Skáli
Hallur Thomsen, Støðlagøta 2A, 160 Argir
Hans Andreas Joensen, Ovaragøta 56, 188 Hoyvík
Herman Winther, 435 Streymnes
Hervør Hergudóttir, 386 Bøur
Ingeborg Godtfred, Garðsgøta 21, 160 Argir
Jákup Bech Jensen, Blákollugøta 16, 100 Tórshavn
Jákup Egholm Hansen, Bóndaheygur 9, 100 Tórshavn
Jákup Oluf á Lakjuni, Helnabrekka 9, 700 Klaksvík
Jóhannus Danielsen, Høganesvegur 58, 650 Toftir
Jona Nielsen, Undir Fossum 44, 700 Klaksvík
Marin í Dali, Tórsbyrgi 10, 100 Tórshavn
Ólavur Samson, Kráargøta 76, 700 Klaksvík
Ronald F. Poulsen, Turiðargøta 27, 100 Tórshavn
Signar Skaalum, í Syðrutoftum 15, 826 Trongisvágur
Suni Vinther, Hvarvið 1, 100 Tórshavn

ATKVØÐURÆTTUR
Atkvøðurætt hava øll, sum hava verið tryggingartakarar í felagnum síðani 1. januar 2008.
Tryggingartakarar, har árliga tryggingargjaldið er minni enn kr. 50.000,- hava 1 atkvøðu. Fyri hvørjar byrjaðar kr. 50.000,- í árligum tryggingargjaldi harafturat, fær limurin 1 atkvøðu upp til í alt 10 atkvøður.
Tað ber ikki til at atkvøða við fulltrú.

ATKVØÐUSEÐIL OG TÍÐARFREIST
Atkvøðuseðlar kunnu umbiðjast frá 11. februar 2008 til og við 24. februar 2008 á høvuðsskrivstovu felagsins.
Atkvøðuseðil kann umbiðjast við at ringja til tel 345600, senda fax til 345601 ella teldupost til tf@trygging.fo.

Neyðugt er, at viðskiftafólk, ið persónliga biðja um atkvøðuseðil á deildum felagsins, hava samleikaprógv við sær. Verður atkvøðuseðil umbiðin um tel, fax ella teldupost, er neyðugt at upplýsa um navn/navn á virki, bústað og føðingardag.

Atkvøðuseðilin skal verða latin innaftur til Ognarfelag Tryggingartakaranna, postadressa Rasmussen & Weihe , í seinasta lagi fríggjadagin 29. februar 2008.

VALÚRSLIT
Tá valúrslitið fyriliggur, verður tað almannakunngjørt í fjølmiðlunum og á trygging.fo.

Tórshavn, 8. februar 2008
Stjórnin

sansir.fo

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA
Kongabrúgvin · Postboks 329 · FO-110 Tórshavn
Tel 345600 · Fax 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo